Sjókaféin í Runavík:

# Málninga- og keramikkframsýning

TÍÐINDASKRIV


*Eyðna Davidsen Hestbæk og Henrik Hestbæk hava framsýning í Sjókaféini í Runavík*

Eyðna Davidsen Hestbæk úr Æðuvík og Henrik Hestbæk hava Málninga- og keramikkframsýning í Sjókaféini í Runavík

Eyðna er ættað úr Æðuvík og fór sum ung niður til Danmarkar á Listháskúla í Kerteminde har hon møtti Henriki, sum hon giftist við, og eiga tey tvær døtrar (10 og 13 ár). Tey eru bæði útbúgvin lærarar á Seminariet for kunsthåndværk og håndværk har høvuðsevnið hjá Eyðnu var "maleri og beklædning" og hjá Henrik "keramik og metal/træ".

Eyðna hevur eisini gingið á Listaskúla í Odense og Silkeborg, umframt at hon hevur tikið ymisk skeið. Eyðna er listafólk burturav og hevur atalier í Fynshoved. Hon málar ekspressjonistiskt og avmyndar fyri tað mesta kvinnur. Íblásturin fái eg frá fólki eg møti – eitt andlitsbragd, ein kropsburður, eitt skjótt brá ið verður hangandi á nethinnuni sum síðani kemur fram á løriftinum. Eyðna málar akryl á lørift. Henrik hevur verkstað heima, har hann stoypir bronzu og rakubrennur leirlist. Harumframt undirvísir Henrik eisini á ymiskum skeiðum.

Eyðna og Henrik hava verið við á nógvum ymiskum framsýningum í Danmark. Tey eru m.a. við á fastari framsýning í Kunst Gården í Bogense og Galleri Nordskov umframt at tey hava verið við á fleiri skiftandi famsýningum. Hetta er tó fyrstu ferð, tey sýna fram í Føroyum. Ferniseringin týsdagin 4. juli var vælvitjað. Eyðna og Henrik eru á einum máli um, at stendur tað til tey, so er tað ikki fyrstu ferð tey sýna fram í Føroyum. Framsýningin í Sjókaféini er opin mán.-frí. kl.10-16 í tíðarskeiðinum 4.-12.juli. Sí meira á: www.eydna.dk og www.henrik-hestbaek.dk



# Margit Rasmussen 70 ár

10. juli verður Margit Rasmussen á Strondum 70 ár. Mamma er ættað úr Norðragøtu. Foreldur hennara vóru Frida f. Jacobsen, ættað úr Vestmanna, og Anton Bernhard (Benni) Hansen úr Norðragøtu.

Mamma vaks upp í Norðragøtu, men longu sum 14 ára gomul fór hon út at tæna. Um hetta mundi misti hon eisini faðir sín av vanlukku umborð á Trónda í Gøtu.

Tey vóru sjey syskin, har mamma var elst. Av teimum eru øll á lívi, uttan Odda (Oddfríða Weihe), sum doyði í 1985 av sjúku, 48 ára gomul.

Mamma tænti fyrst í Klaksvík og síðan í Vestmanna. Eftir hetta fór hon til Havnar at arbeiða á Sjómansheiminum. Har hitti hon pápa okkara, John Rasmussen, sum tá var í læru hjá Asbjørn Skarðhamar í Havn sum elektrikkari. Tey giftust 30.maj 1955.

Tey fingu fýra børn, Anton, (f. 1954), Andras, (f. 1958), Jónfríð (f. 1961) og Marjun (f. 1968). Anton doyði í 1988, 34 ára gamal av sjúku.

Ommubørnini vóru átta í tali. Elsta ommubarnið, John (sonur Andras og Marin) doyði í 1997 15 ára gamal av sjúku. Haraftrat so eigur hon eisini eitt langommubarn.

1. okt 1965 byrjaði pápi egið virksemi. Mamma tók sær av handlinum og skrivstovuni, og tað ger hon enn tann dag í dag.

Sjálvt um tú, mamma, hevur havt nógvar tungar løtur í tínum lívi, so ert tú altíð positiv og løtt í sinni. Altíð so blíð og glað at koma inn til. Veitst tú, at vit eru á veg út á Strendur, fer mixarin í sving, og bollarnir verða bakaðir, og vaflur og pannikøkur eisini.

Tað er altíð deiligt og hugnaligt at koma á vitjan . Vit vilja siga tær tillukku á føðingardegnum, takk fyri alt tú hevur verið og ert fyri okkum. Vit ynskja tær framhaldandi nógv góð ár.

**Heilsan Andras, Jónfríð og Marjun við fam.**

Faroe Dive, Klaksvík:

# Johannes og Djóni fingið kavaraprógv

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 7. juli fingu tveir næmingar prógv sum kavarar frá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík. Teir hava í eitt tíðarskeið fingið grundleggjandi undirvísing í kaving. Nøkur av teimum evnum teir hava arbeitt við eru ástøði, kaving í svimjihøll og ikki minst kaving í sjónum. Ungu kavararinir hava fingið nógv burturúr undirvísingini og ætla sær at gera nógv við kavingina tá teir koma heim.


*Á myndini síggja vit næmingarnar eftir seinasta kavið á grundskeiðnum, f.v.: Johannes Petersen, Hov, Djóni Petersen, Hov og Janus Joensen, instruktørur*

## Andlát og jarðarferðir

**Helga Strømsten,** Norðragøta, andaðist sunnudagin, 78 ára gomul. Kistan kemur í kirkjuna týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkjuni mikudagin kl. 14.

**Sverri Eidesgaard** fer til gravar úr Oyndarfjarðar kirkju týsdagin 11. juli, kl. 14. Tey, sum vilja minnast Sverra, kunnu lata Oyndarfjarðar kirkju ein peningagávu.

**Henry Heinesen,** skipari, ættaður heiman av Sandi, búsitandi í Klaksvík, andaðist í heiminum sunnudagin, 9. juli, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Dagurin í morgin

**10. juli. Josva.** Dagurin halgaður minninum um Josva Nuns son, sum var eftirmaður Mósesar og leiddi Ísraels fólk inn í hitt fyrijáttaða landið. Sama navnið sum Jesus, *Guð frelsir.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Lydia Dorthea Vesturtún**
fødd Ellingsgaard, Eiði

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Emil prest, organist, kirkjutænarar, sangarar, gravarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Eiðis kirkju. Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Petur Ove, Sigrid og Olaf Emil við familju**

Haldið Sosialin!


**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú fyri einans
**450,- um ársfjórðingin**
**Sparið 395,-** í mun til leysasølu!

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Send lepan til:
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn